# ítróttur

Nr. 82 • fríggjadagur • 17. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tjaldur styrkir hópin



*Eftir at tær í vár fluttu upp, fer Tjaldur nú at styrkja um besta kvinnuliðið*

**Umframt Militsu Ergic verður í minsta lagi ein útlendskur leikari á kvinnuliðnum úr Runavík**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at kvinnuliðið úr Runavík hevur steðgað eitt ár í næstbestu deildini, verða tær komandi ár aftur at síggja í bestu hondbóltsrøðini.

Og tað er so ikki líkt til, at tær ætla at talan skal verða um nakran stuttan steðg hesaferð. Á liðnum tey bæði seinasta árið hevur liðið havt jugoslavisku Militsa Ergic, og hon verður í øllum førum við á liðnum komandi vetur. Tað verður leikandi venjarin í fjør, Vesna Tomajek, hinvegin ikki, og tí hevur Tjaldur gjørt av at styrkja um hópin. Sum skilst, er ein nýggjur jugoslaviskur leikari á veg til liðið, men enn er tó ikki greitt, hvussu navnið á hesari er.

### Fáar broytingar

Hjá monnunum verður talan væntandi um á leið sama lið, sum í fjør stóð seg hampuliga væl, tó at endastøðan ikki gjørdist heilt so góð, sum tað eitt skifti var líkt til.

Útlendsku leikararnir á liðnum halda væntandi fram, men tó við teirri broyting, at Zoran Sarcevic bert verður venjari hetta árið, og ikki leikandi venjari, sum hann var í fjør. Enn er ikki gjørt av, hvørt runavíkingar fara at fáa enn ein útlending á liðið, so útlendingakvotan verður nýtt til fulnar, men sum skilst, so er hetta ikki heilt ósannlíkt.

# Sivic landsliðsvenjari



*Tomislav Sivic heldur fram sum venjari. Nú er hann settur í starv sum venjari hjá jugoslaviska U-16 landsliðnum, og tað er ein stór viðurkenning*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fyrrverandi venjarin hjá VB, B36 og KÍ, Tomislav Sivic, er settur í starv sum landsliðsvenjari hjá jugoslaviska U-16 landsliðnum. Hetta skrivar almenna heimasíðan hjá KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Síðani Sivic fór úr Føroyum síðsta heyst, hevur hann tikið nøkur venjaraskeið í Jugoslavia, og hann hevur annars tikið sær av løttum saman við konuni Miru og børnunum í heimbýnum Subotica, sum liggur har norði í Jugoslavia.

Sivic og konan eru sera fegin um nýggja starvið hjá honum, tí hetta er sum vera man ein sera stór viðurkenning. Sivic fer undir nýggju avbjóðingina í næstum, og hetta er fyrstu ferð, at ein venjari úr Subotica er settur í starv sum landsliðsvenjari.

Fyrsta uppgávan hjá Sivic verður kappingin millum U-16 landsliðini á Balkan. Hon verður hildin í Grikkalandi í næstum.

Yrkisleiðin sum venjari heldur sostatt fram hjá jugoslaviska fótbóltssambandinum, eftir at hann hevur roynt seg sum venjara hjá VB, B36 og KÍ í Føroyum. Sivic vann FM-heitið við B36 í 1997. Harumframt hevur hann royndir sum yrkisleikari í heimlandinum, Jugoslavia, Fraklandi og Íslandi.

# Lýsa við Toda




*Lýsingin hjá Synoptik, sum í mikudagin var at síggja í fleiri donskum bløðum*

**Synoptik í Danmark hevði mikudagin stórar lýsingar, har høvuðsevnið er annað brotssparkið, sum Todi Jónsson átti í Parkini sunnudagin**

FÓTBÓLTSLÝSING
*Jákup Mørk*

Ivast tú í, um Todi Jónsson átti fríspark, tá Krister Nordin togaði hann niður seinasta sunnudagin, so eru eyguni farin at bila. Hetta er í øllum førum klokkuklári boðskapurin frá donsku handilsketuni, Synoptik.

Í stórari lýsing verður fyrst spurt, um talan var um brotsspark, og niðan fyri stendur so, at tú er vælkomin at fáa eina sjónarroynd.

Lýsingin sigur einki um, hvørt Kim Milton Nielsen longu hevur verið og kannað sær eyguni, nú áðrenn hann skal døma dystir í HM-kappingini.



# Ruðulleiki í botnstríði

**Kærunevndin hjá DBU gjørdi mikudagin av, at Vejle kortini ikki fær trý stig fyri dystin móti AB. Møguliga fer Vejle at kæra, og møguliga fer Vejle at lata inn kæru í einum heilt øðrum máli**



*Christian Høgni Jacobsen og hinir í Vejle vistu hósdagin ikki, hvørt teir vóru keypir ella seldir*

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Hóskvøldið skuldu Christian Høgni Jacobsen og liðfelagarnir í Vejle stríðast fyri seinata møguleikanum at verða verandi í bestu donsku deildini. Men dagin fyri dystin fekk leiðslan í felagnum ein skelk, tá DBU gjørdi av, at liðið kortini ikki fær tey trý stigini, sum teir í fyrsta umfari fingu tillutað á skrivaraborðinum.

### Pólverjar hoyra til ES

Málið, sum øll trætan byggir á, er nýtslan hjá AB av sonevndum ikki-ES borgarum. Í dystinum móti Vejle, sum AB annars vann greitt, gjørdu akademikararnir vart við, at teir helst høvdu nýtt fýra ikki-ES borgarar í dystinum. Mest loyvda tali av hesum eru tríggir.

Eftir at DBU viðgjørdi málið, gjørdu teir av, at Vejle skuldi tey trý stigini, sum spælt varð um, og tað eru júst hesi, sum fram til mikudagin hildu lív í bjargingarroyndini hjá Vejle.

AB gjørdi tó greitt, at teir fóru at kæra dómin, og nú er kærunevndin hjá DBU so komin til aðra niðurstøðu. Ein av teimum fýra leikarunum, sum málið snýr seg um, er nevnliga pólverski Piotr Stokowiec. Tá ES hevur eina serstaka samstarvsavtalu við Póland, hevur DBU gjørt av, at pólskir leikarar eru at rokna sum ES-borgarar, og tí hava teir nú givið AB tey trý stigini aftur.

Eftir øllum at døma sendi avgerðin Vejle niður í næstbestu donsku deildina longu undan seinasta umfarinum, men felagið kann tó innan tvær vikur kæra avgerðina til kærunevndina hjá DIF, Dansk Idræts-Forbund.

### Nýggjur møguleiki

Hóast Vejle við kúvendingini á skrivaraborðinum hevur mist møguleikan at taka AGF aftur í botnstríðnum, so tykjast allar súður kortini ikki at vera syftar.

Danska Ekstra-Bladet skrivar nú, at Vejle møguliga fer at senda inn kæru um dystin móti Lyngby, sum púrasta óvæntað endaði við javnleiki, 2-2. Hetta er einasta stigið, sum Lyngby hevur fingið, eftir at felagið fór á heysin í vetrarsteðginum.

Talan skal vera um, at Lyngby møguliga hevur gjørt nýtslu av ólógligum leikara. Nick Randrup varð skiftur inn bert tveir minuttir fyri leiklok í dystinum, men dagin fyri hevði hann leikt á Danmark-arseriuliðnum hjá Lyngby, og sambært reglunum er ikki loyvt at nýta leikara á tveimum liðum sama leikdag. Spurningurin, sum í løtuni verður kannaður í Vejle, er tó, hvørt tað rakar superligu- ella danmarkarseriuliðið hjá Lyngby, um kæra verður latin inn.

### Fullkomin ruðulleiki

Soleiðis bendir alt á, at talan verður um fullkomnan ruðulleiki, um so er, at Vejle vinnur seinasta dystin, samstundis sum AGF tapir ella spælir javnt. Um so er, so kunnu málini á skrivaraborðinum gera av, hvat lið skal flyta úr superliguni, og fyri íblandaðu feløgini er tað av alstórum týdningi, at málið verður avgreitt sum skjótast.

Eitt nú kunnu liðini neyvan nýta eins nógva fíggjarliga orku, um tey skulu spæla í 1. deild, og tí mugu tey helst vera sera varin við at keypa ella selja, so leingi eingin avgerð er fingin í málunum.

Og ikki minst man tað vera tungt hjá leikarunum. Eitt nú Christian Høgni Jacobsen frítt at fara, um Vejle flytir niður úr Superliguni, men alla tað tíð at avgerðin liggur á skrivaraborðinum hjá DBU, er einki víst í so máta, og tað kann uttan iva skaða møguleikarnar hjá føroyska landsliðsmanninum at finna nýtt felag, um hann noyðist at bíða í fleiri vikur ella kanska mánaðir, áðrenn hann kann taka avgerð um framtíðina.

# Kappingin byrjar týsdagin

Sum onkur av lesarunum kanska hevur lagt til merkis, so lýstu vit í serblaðnum, Fótbóltur 2002, við, at ein kapping um eina fótbóltsferð skuldi byrja í Sosialinum týsdagin, 7. mai.

Verkfallið hevur tó viðført, at útberingin av bløðunum kring landið hevur verið heldur óreglulig, og tí hevur verið bíðað við kappingini. Nú er verkfallið tó liðugt. Strandfaraskipini sigla aftur við fullari ferð, og komandi týsdag fer kappingin um ferðina til dystin millum Týskland og Føroyar so av barkastokki.

**-jm**

# Skála vann á Argjum

Orsakað av verkfallinum, hevur stórt óskil verið í hvussu, dystirnir í millum øðrum 2. deild hjá kvinnum hava verið leiktir.

Í einstøkum førum hevur tó ikki verið neyðugt við sigling. Skála vitjaði AB herfyri, og tann dystin vann Skála 5-3.

Væntandi fer FSF í næstum at gera av, hvussu útsettu dystirnir skulu avgreiðast.

**-jm**

# Jakob Jónsson aftur í Kyndli



**Ársins leikari og – áleypari fer komandi vetur at spæla við Kyndli, sum eisini var fyrsta føroyska felag hansara**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrr í vikuni boðaði Kyndil frá, at komandi vetur fer ársins leikari í føroyskum hondbólti, Jakob Jónsson, aftur at spæla við Kyndli, har hann eisini verður leikandi venjari.

Hetta er júst sami leiklutturin, sum Jakob hevði, tá hann av fyrstan tíð kom til Kyndil. Hetta var kappingarárið, 1998/99, og gjørdist hann somuleiðis ársins leikari tað árið. Eftir tvey ár í grøna búnanum gjørdi Jakob fyri tveimum árum síðani av at skifta til grannarnar úr Neistanum, har hann í fjør var við til at vinna tvey silvurmerki.

Tað var annars nakað av gramli at hoyra um, at roynd íslendingurin ætlaði sær at gevast við fyrstudeildarhondbólti eftir seinasta kappingarár, men nú hevur hann so gjørt av at taka eitt tørn afturat.